skemt



# Klárur at rykkja út

Føroyska ferðavinnan er í støðugum vøkstri, og hóast bókingar ofta verða gjørdar í góðari tíð frammanundan, so skulu fólk í ferðavinnuni eisini verða skjót á fótum við hvørt. Hesin bussurin er væl fyrikreikaður – klárur á útskjótingarrampuni, um so er at ferðavinnan kallar.

## Leyst og fast um stórt og smátt

**Føroyskt heitið fyri Skipsingeniør skal verða Sjó-verkfrøðingur.**

**Navnauppskot til Sosialin: JAN´SA GUTTAR**

**Navnauppskot til komandi útvarpið hjá Sosialinum: Oyravoks-botn**

**Mundi Jan fáa nakrar olju-málningar til hátíðardagin?**

**Spældi Deja Vu í Gundadali 2. Hvítusunnudag? Skála tapti aftur 2-5 ímóti HB, eftir at hava verið á odda 1-0. Nú vita vit hvat triðji dysturin teirra millum endar!**

**Tað gekk væl hjá AKU PUNKTURUVIC hjá VB/Sumba at stinga frens á Argjum.**

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Bead kann merkja sveittadropi**
Nógv av húsunum, sum standa tóm í Føroyum, kundu væl verðið brúkt til ferðafólk. Til dømis til Ból og Bita, ella Bead and Breakfast, sum er ein gistingarháttur, útlendingum dámar væl.
www.uf.fo

**Álvara?**
Gentur og dreingir eru ikki líka.
Formaðurin í Lærarafelagnum í Útvarpinum

**Tað er vónleyst at vita**
Hetta kom sera illa við at missa sjálvan liðskiparan so tíðliga í dystinum, men hóast tað, fekk hetta so at siga onga ávirkan á dysti.
Dimma

**Er tað ikki sjálvsagt?**
Allar videoupptøkur verða bandaðar.
Skelti á bensinstøð

**Trúgvin flytir neyvan fjøll**
Verður kirkjuskatturin ov høgur, er vandi fyri, at fólk fara at melda seg úr fólkakirkjuni.
John Johannesen, løgtingsmaður

# Landsverk ella Vatnsverk

Landsverk røkir millum annað føroyska vegakervið. Vegir verða gjørdir í stand, bilverjur settar upp, vegirnir grivnir fyri kava, tá ið tann tíðin er, og skelti skulu eisini geva røttu boðini. Men Landsverk er ikki bara stórar maskinur, bilur og jeepar. Landsverk hevur – sum tað sæst á myndini – eisini ein bát til taks – og tað er kanska hent – um ikki endiliga á vegunum...

